Kvinna við bróstkrabba:

# Myndugleikarnir lúgva um bíðilistan



**- Kvinnur við knykli í bróstinum verða ikki tiknar fram um á bíðilistanum til mammografi-kanning. Tann, sum pástendur tað, sigur ósatt. Var eg ikki sjálv farin til Danmarkar, stóð eg framvegis á einum 14 vikurs bíðilista hjá Landssjúkrahúsinum, sigur ein kvinna, sum í farnu viku tískil varð skurðviðgjørd fyri bróstkrabba á donskum privatsjúkrahúsi**

BÍÐILISTIN Á LSH
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

16. mars fær ein føroysk kvinna staðfest ein knykil í bróstinum. Eftir ávísing frá læknanum vendir hon sær alt fyri eitt til Landssjúkrahúsið fyri at avtala eina tíð at koma til mammografikanning. Kvinnan ger frá byrjan greitt, at ein knykil er staðfestur, men fær kortini boð um, at orsakað av langa bíðilistanum, kann hon ikki koma til kanning fyrr enn 23. juni. Also 14 vikur seinni. Samstundis fær hon at vita, at um støðan er heilt bráðfeingis, kann hon fáa læknan at skunda undir umsóknina. Um hetta ikki ber til, kann hon sjálv kanna møguleikarnar fyri at koma til kanning uttanlands.

### Knykilin var illkynjaður

Kvinnan fekk seg illa at trúgva boðunum, hon hevði fingið, og ringdi tískil fleiri ferðir aftur til Landssjúkrahúsið fyri at tryggja sær, at hon hevði skilt tey rætt. Men svarið var tað sama hvørja ferð.

- Eg dugdi veruliga ikki at síggja, hvussu støðan skuldi gerast meir bráðfeingis fyri tað, um eg fekk læknan hjá mær at siga Landssjúkrahúsinum tað sama, sum eg sjálv hevði sagt teimum fleiri ferðir. Eg visti eisini, at ikki hoyrdi til sokallaða vandabólkin, har bróstkrabbi er í familjuni, sum møguliga kundi gjørt, at eg var tikin fram um onnur á bíðilistanum. Tað einasta eg visti var, at eg orkaði ikki at bíða í 14 vikur eftir møguliga at fáa at vita, at eg hevði krabbamein.

Kvinnan valdi tískil sjálv at fáa eina avtalu og rinda fyri at verða kannað á einum donskum privatsjúkrahúsi. Í farnu viku var endaliga svarið so greitt: Knykilin var illkynjaður. Kvinnan vendi sær aftur til Landssjúkrahúsið, hesu ferð fyri verða skurviðgjørd, men fekk at vita, at viðkomandi lækni var í feriu. Tískil fór kvinnan aftur til Danmarkar, har hon fríggjadagin var skurðviðgjørd fyri bróstkrabba.

### Andsøgn

- Eg veit sjálvandi ikki, hvussu nógv mín støða var versnað, um eg skuldi gingið og bíða til 23. juni fyri at koma til kanning á Landssjúkrahúsinum. Men hendan bíðitíðin er í øllum førum í stórari andsøgn við áhaldandi tilráðingarnar frá læknum og mynduleikum um, at kvinnur sjálvar skulu kanna seg fyri knyklar í bróstinum og fara til læknan alt fyri eitt, um okkurt er. Vit fáa jú allatíðina at vita, at jú fyrr viðgerðin fyri krabbamein kemur í gongd, tess betri eru møguleikarnir fyri at yvirliva. Hetta kann bert skiljast á tann hátt, at órimiliga langi bíðilistan í ringasta føri kann kosta lív, sigur kvinnan.

Kvinnan leggur afturat, at hjá henni er ikki so nógv annað at gera nú enn at taka ímóti teimum eftirviðgerðartilboðum, sum eru, og so vóna tað besta. Men hon stúrir fyri, hvussu nógvar kvinnur standa í somu støðu, sum hon stóð í fyri eini viku síðani - í nívandi ótta við einum knykli í bróstinum uttan útlit til at verða kannaðar fyrr enn um eini tríggjar mánaðir.

- Eg vil bara, at kvinnur skulu vita, at tær skulu ikki vænta sær at verða tiknar fram um á bíðilistanum, fyri tað um ein knykil í bróstinum er staðfestur. Pástendur Landssjúkrahúsið ella landsstýrismaðurin tað, siga tey ósatt, sigur kvinnan.

### Spæla við heilsuna

Kvinnan kann bara ímynda sær, at politikarnir onki ána um støðuna, tá teir nú hava ætlanirr um at brúka milliónir uppá at fara undir mammografi-screeningar, sum eru kanningar av kvinnum, sum enn ikki hava funnið nakran knykil.

- Eitt er, at tað eftir øllum at døma er sera ivasamt, hvussu gott tað er við mammografi-screeningum. Men at brúka milliónir og ovurhonds nógva orku til at leita eftir møguligum knyklum í bróstinum, tá vit ikki ein gang megna at taka hond um knyklar, sum longu eru staðfestir, tykist púra purturvið. Hetta er at spæla við heilsuna hjá kvinnum, sigur ørkymlaða kvinnan.

Í Danmark hevur heilsustýrið sett krav til amtini um, at tað í mesta lagi mugu ganga tvær vikur frá tí ein knykil er staðfestur, til mammografikanningin verður gjørd. Maktar almenna sjúkrahúsið ikki at gera hesa kanning til ásettu tíð, hevur kvinnan rætt til at verða kannað á privatsjúkrahúsi, har tað almenna rindar kostnaðin.

Føroyska kvinnan hevur higatil sjálv goldið 8000 krónur fyri kanningina umframt ferðaútreiðslur tvær ferðir aftur og fram til Danmarkar. Um hon fær hetta endurgoldið frá føroyskum mynduleikum er sera ivasamt. Tað hava teir nevniliga ikki skyldu til, so leingi tað ikki er føroyska heilsuverkið sum hevur ávíst sjúklinginum viðgerð aðrastaðni.

Røntgenlækni:

# Gera alt vit kunna



**Jógvan Dahl Niclasen, yvirlækni á røntgendeildini á Landssjúkrahúsinum, váttar, at bíðitíðin í løtuni til mammografikanning er út við 16 vikur.**
**- Er ein knykil staðfestur, royna vit, alt vit kunna, at taka kvinnuna fram um, um tað ber til. Stóri trupulleikin er, at deildin er so undirmannað í mun til arbeiðsbyrðuna, sigur yvirlæknin**

BÍÐILISTI Á LSH
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

- Um ein kvinna hevur fingið staðfest ein knykil í bróstinum, gera vit, hvat vit kunna, fyri at kroysta hana inn ímillum á bíðilistanum til mammografi-kanning, allarhelst innan tvær vikur. Tí er tað sera týdningarmikið, at vit fáa greið boð um, hví kvinnan skal kannast, sigur Jógvan Dahl Niclasen, yvirlækni á røntgendeildini á Landssjúkrahúsinum.

Jógvan vísir á, at tað kunnu vera ymsar orsøkir til at kvinnur ynskja eina mammografikanning. Summar hava følt okkurt, summar bera ótta fyri, at tær hava arvað sjúkuna, meðan aðrar bert vilja tryggja sær, at onki er galið.

### Fjølmiðlarnir ávirka

- At eftirspurningurin eftir hesum kanningum er so stórur í løtuni, er uttan iva ein avleiðing av nógva tosinum um mammografi, sum hevur verið í fjølmiðlunum í seinastuni. Um vit fylgja gongdini yvir eitt áramál, sæst rættiliga týðiliga, at hesi bæði tingini hanga saman, sigur Jógvan.

Men sambært yvirlæknanum, er grundleggjandi orsøkin til langa bíðilistan, at røntgendeildin er so undirmannað í mun til arbeiðsbyrðuna sum heild. Meðan talið á mammografi kanningum er økt við út við 40% seinastu 10 árini og samlaða tali av kanningum við 26%, hevur starvsfólkatalið á deildini verið óbroytt í 20 ár. Og hetta ávirkar øll kanningarøki á deildini. Deildin hevur fleiri ferðir sett fram ynski um, at fáa

*- Stóri trupulleikin á deildini er, at vit eru so undirmannað í mun til øktu arbeiðsbyrðuna, sigur Jógvan Dahl Niclasen, yvirlækni á røntgendeildini á Landssjúkrahúsinum*